gult cyan magenta svart



# Togast um Teistan



*Heimasandsmenn og skopuningar tykjast ósamdir um, hvar Teistin skal fara fyrstu ferð hann vitjar Sandoynna*
*Mynd: Jens K. Vang*

**Líkt er til, at sandoyingar ikki eru samdir um, hvar Teistin skal sýnast fram fyri almenninginum fyrstu ferð, hann vitjar oynna**

TRÆTUMÁL
*Edvard Joensen*

Sagt verður í Sandoynni, at ósemja er við at taka seg upp um, hvar Teistin skal leggja at á fyrsta túrinum. Skopuningar taka sum givið, at hann kemur til Skopunar, tí tað er har, hann skal sigla fast, meðan ávísir politikkarar heiman av Sandi vilja hava hann til Sands framsýningartúrin.

Kelda okkara, sum vil vera ónevnd, men hvørs samleika Sosialurin kennir, sigur, at okkurt er, sum bendir á, at ósemja er við at taka seg upp um, hvar skipið skal leggja at á hesi fyrstu vitjan síni í Sandoynni.. Keldan heldur, t tað er poltitiski stoltleikin hjá onkrum almennum persónum, sum ger seg galdandi.

Hvussu er og ikki, er greitt, at skopuningar fyrireika eitthvørt í samband við, at Teistin kemur í sigling.

Gerhard Lognberg, borgarstjóri í Skopun, sigur, at skopuningar gleða seg til nýggja skipið, og ætla at markera dagin, tá tað kemur fyrstu ferð í Sandoynna.

Teistin fer í reguliga sigling millum Skopun og Gomlurætt um páskirnar, sigur Reidar Nónfjall, stjóri á Strandfarskipum Landsins. Um tað verður beint undan ella beint eftir páskir, veit hann ikki nágreiniliga enn. Men eykaloyvi hjá Tróndi gongur út tann 15. apríl, sum er páskadagur, so tað verður um ta tíðina.

Orsakað av havnarviðurskiftunum í Hesti, verður ikki siglt út í Hest beinanveg, Teistin fer í sigling. Tað verður helst ikki fyrr enn einaferð í summar, at ferjulegina í Hesti verður klár at taka í móti honum.

Strandfaraskip Landsins fáa annars Teistan handaðan frá Skipasmiðjuni á Skála leygardagin 31. mars. Síðan skal manningin brúka nakrar dagar at kunna seg við og um skipið, áðrenn hildið verður ráðiligt at fara undir ferðafólkaflutning.

– Men um páskirnar verður tað so, sigur Reidar Nónfjall.

# Bróta Skopunar Havn niður

**Í Skopun fyrireika tey seg til at taka í móti Teistanum. Molin, sum portrið stendur ímóti, verður tikin niður, so innsigligin gerst rúmari**

SAMFERÐSLA
*Edvard Joensen*

**Skopun:** Nú bróta teir Skopunar Havn niðuraftur. Tó ikki alla, uttan bara ein part av pierinum við innsiglingina.

Einaferð var tað Ritan, sum var »for tjukk«. Nú er tað Teistin. Men ráð eru fyri tí. Innsiglingin verður víðkað, so hann ótarnaður kann sigla ígjøgnum. Men tað krevur so aftur, at portrið verður longt.

Tiknir verða seks metrar av molanum, og portrið verður so longt tilsavarandi, sigur Gerhard Lognberg, borgarstjóri í Skopun. Hvat hetta arbeiðið fer at kosta, veit borgarstjórin ikki at siga.

Sosialurin hevur frætt, at tað fer at kosta einar seks milliónir krónur. Tríggjar fyri at taka molan niður og gera skinnarar til portrið í aftur stubban. Og aðrar tríggjar fyri at leingja portrið. Av havnadeildini hjá Landsverkfrøðinginum fingu vit tað svar, tá vit ringdu, at tað var bara landsverkfrøðingurin sjálvur, sum kundi svara okkum upp á spurningin. Men Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingur, var ikki at hitta, so tað bar ikki til at fáa alment váttað, at hetta arbeiðið í Skopunar Havn kostar seks milliónir krónur.



*Innsiglingin í Skopunar Havn verður breiðkað 6 metrar og portrið longt tilsvarandi*
*Mynd: Edvard Joensen*



# Elin farin frá

**Elin Mørkøre, sum hevur starvast á Landssjúkrahúsinum sum reumatologur í 27 ár, er nú farin frá**

STARV
*Turið Kjølbro*

Í seinastu viku var móttøka á Landssjúkrahúsinum í sambandi við, at Elin Mørkøre, reumatologur, fór frá fyri aldur. Í komandi mánaði verður Elin 69 ár. Upprunaliga ætlaði hon at fara frá fyri tveimum árum síðani, men valdi at halda fram eitt skifti til Landssjúkrahúsið hevði útvegað annan reumatolog. Enn hevur ikki eydnast Landssjúkrahúsinum at seta annan reumatolog í starv. Sum skilst vanta læknar innan hesa sergrein um øll Norðurlond og aðra staðni við. Helst fer tað kortini at eydnast at fáa ein vikar hendavegin í eitt stutt skifti í vár.

Elin hevur havt ein langan arbeiðsdag hesi nógvu árini á Landssjúkrahúsinum, og tí er ikki sørt, at tað er gott at sleppa at gera nakað annað.

- Eg veit ikki, hvussu tað fer at verða ikki at fara til arbeiðis hvønn dag, eg skal royna tað fyrst, men tað verður ivaleyst gott at brúka tíðina til annað, familju og vinir. Hinvegin er tað eitt sindur keðiligt at fara, tá ið eingin er at taka yvir. Sum reumatologur hevur verið nógv at gera, tað átti í grundini at verið tveir reumatologar í Føroyum, so nógvar eru uppgávurnar. Eg eri ikki bangin fyri ikki at fáa tíðina at ganga. Mín vón er bara at Landssjúkrahúsið fær ein annan reumatolog, sigur Elin Mørkøre.

Elin Mørkøre varð út búgvin lækni í 1958 og reumatologur í 1970. Ein reumatologur er serlækni í giktsjúkum og sjúkum innan rørslulimir, vøddar og liðir. Í 1970 byrjaði hon við privatviðtalu í Havn, tí einki starv var á Landssjúkrahúsinum. Í 1974 gjørdist hon konsulentur á Landssjúkrahúsinum um somu tíð, sum hon hevði privatviðtaluna, og síðani 1974 hevur hon havt sína dagligu gongd á Landssjúkrahúsinum, síðani 1981 sum yvirlækni.



*Mín vón er at Landssjúkrahúsið fær ein annan reumatolog, sigur Elin Mørkøre, reumotologur, sum nú er farin frá fyri aldur.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# 14 kvinnur og seks børn gistu í Kvinnuhúsinum

**Vegna harðskap frá manni ella sambúgva gistu tilsamans 14 kvinnur og seks børn á Kvinnuhúsinum í fjør í tilsamans 306 samdøgur**

HARÐSKAPUR MÓTI KVINNUM
*Eirikur Lindenskov*

Hósdagin í síðstu viku hevði Kvinnuhúsfelagið aðalfund í KFUM. Í nevndini í Kvinnuhúsfelagnum sita Edna Jørgensen, sum er forkvinna, Kristian Ferjá, sum er næstforkvinna, Henrid Johansen, kassameistari og Finngerð Fríðriksdóttir og Frígarð Sundsgarð, sum báðar eru nevndarlimir.

Í fjør hava 39 kvinnur arbeitt sum sjálvbodnar í Kvinnuhúsinum. Tær hava arbeitt í vaktarskipanini sum kvøld- og náttarvaktir, sitið í nevndum og í ráðgevingini.

Felagið sigur í tíðindaskrivi, at arbeiðið hjá Kvinnuhúsinum er fjølbroytt, og at tey altíð hava brúk fyri fleiri vaktum. Um onkur hevur hug at hjálpa til við hesum arbeiði, so ber til at seta seg í samband við felagið á telefon 317200 at frætta meira.

Kvinnuhúsfelagið hevur limafund eina ferð um mánaðin.

Tað er Kvinnufelagið, sum rekur Kvinnuhúsið, ella Kreppumiðstøðina, sum hon eisini verður rópt. Har kunnu kvinnur fáa ráðgeving og vegleiðing. Tað er ókeypis hjá kvinnum at venda sær til Kvinnuhúsið, og tær skulu ikki rættvísgera, hví tær gera tað, sigur Elin Reinert Planck frá Kvinnuhúsinum.

Møguleiki er eisini hjá kvinnum at gista á Kreppumiðstøðini saman við børnum í styttri tíðarskeið.

– Okkara framtíðarynski er, at tað verður ókeypis at gista á Kreppumiðstøðini, men so er ikki enn, sigur Elin Reinert Planck.

408 áheitanir vóru til Kvinnuhúsið í fjør. Orsøkirnar til áheitanirnar vóru harðskapur, sundurlesing ella hjúnarskilnaður, at maður ella sambúgvi er misnýtari, ótrúskapur, fíggjarligir trupulleikar, incest, sálarligur trupulleiki og ymisk mentan. Áheitanirnar vóru úr 21 ymiskum kommunum. Kvinnuhúsið hevur frá byrjan í 1990 havt áheitanir úr 38 ymiskum kommunum.

Aldurin á kvinnunum, ið vendu sær til Kvinnuhúsið í fjør, var millum 18 og 70 ár. Kvinnurnar siga, at orsøkin til harðskapin er partvís uppvøkstur, øvund, undirlutakenslur, misnýtsla og ymisk mentan.

14 kvinnur og seks børn gistu á Kreppumiðstøðini í tilsaman 306 samdøgur í fjør.

Kvinnuhúsið takkar øllum, sum á ymiskan hátt hava stuðlað arbeiðinum í Kvinnuhúsinum.

# Stór vármótasýning í SMS

MÓTASÝNING
*Eirikur Lindenskov*

Í morgin, mikudagin 28. mars kl. 20.00, verður aftur stór vármótasýning á Torginum í SMS.

Handlarnir, sum verða við á mótasýningini, eru: Deres, Fríðkan, Skálkur, Flykran, Hanus & Jansu, Vero Moda og Klivin.

Tað er aftur í ár Barbara í Gongini, sum leggur mótasýningina til rættis, sigur Rógvi Róin, sum er marknaðarleiðari í SMS.

– Fyrireikingarnar av mótasýningini hava verið í umleið ein mánað, og mótasýningin í ár verður enn betur enn tær undanfarnu. Uppaftur meir orka og tíð er løgd í tiltakið hesaferð, sigur Rógvi Róin.

Hann sigur víðari, at mótasýningin verður á einum slíkum støði, sum sjáldan er at síggja her heima hjá okkum.

– Alt er lagt til rættis og vant frammanundan. Øll vita nær og hvussu tey skulu ganga. Tónleikurin er valdur júst til ávísa handilin, ávísu klæðini og ávísa persónin, og tað er nakað, sum vit ikki eru von við, sigur hann.

Politikkurin hjá SMS, tá tað kemur til mótasýningar, er tann, at skal slík fyriskipast, so skal hon gerast 100%. Og fyrireikarnari lova, at so verður.

– So vit gleða okkum til at síggja nógv fólk í SMS í annaðkvøld kl.

20.00 til ársins stórstu og bestu mótasýning. Tiltakið er ókeypis og varir í umleið hálvan tíma, sigur Rógvi Róin

### Mótasýning til børn og ung leygardagin

Leygardagin 31. mars kl. 12.30 hava Schan og Bindibúðin sína egnu mótasýning á Torginum. Orsøkin til, at hesir báðir handlarnir ikki eru við í stóru mótasýningini mikukvøldið er, at tann sýningini er ikki serliga væl egnað til tær vørur og úrval, sum hesir báðir handlarnir selja. Og harvið fáa hesir báðir handlarnir nógv meir burturúr at hava sýningina leygardagin.

Klæðini, hesir báðir handlarnir sýna fram, eru klæðir til yngra ættarliðið. Schan sýnir fram mótaklæðir til smábørn og hálvvaksin, meðan Bindibúðin sýnir fram nýggjastu bundnu klæðini til børn og ung. Mótasýningin leygardagin er eisini ókeypis.

# Hundaóskil á Ternuryggi

HUNDAÓSKIL
*Eirikur Lindenskov*

Tað eru ikki øll, sum góðtaka politiviðtøkuna fyri Tórshavnar kommunu, sum m. a. sigur, at hundar ikki hava loyvi at ganga leysir.

Ein maður ringdi nú um dagarnar til Sosialin, tí hann visti ikki, hvat hann skuldi gera við tað hundaóskil, sum valdar á Ternuryggi í Havn.

Maðurin, sum hevur havt summarhús í gamla kolonihavanum á Ternuryggi í Havn í fleiri enn 30 ár, sigur, at hann øtast yvir hesar leysu hundarnar.

– Eg havi sjálvur havt hundar, eisini sjefarhundar, í fleiri ár, so eg kenni eitt sindur til tað. Men hesir hundar, sum ganga leysir á Ternuryggi, kunnu ikki hava tað gott, so illir teir eru í sær, sigur hann.

Hann greiðir frá, at hann mátti bakka undan teimum hendan dagin, fyri ikki at verða álopin.

– Eg tori ikki at hugsa tankan, um børn skuldu komið fyri hesar óðu hundarnar, sigur maðurin, sum hevur boðað politinum frá tilburðinum.

– Eg gjørdi teimum greitt, at eg nú havi fingið nokk, og at eg taki byrsu við næstu ferð og skjóti, sigur hann.

Men tað hevur hann ikki loyvi til, hevur hann fingið at vita av politistøðini í Havn. Tað eru bara seyðamenn og bóndur, sum hava loyvi at skjóta leysar hundar.

Løgreglan boðar í slíkum førum hundafangarnum frá óskilinum.